

**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SD 828 **Km:** 69.000
**Árgangur:** 25.11.2003
**Útgjald:** 31.000 **Mðr. gjald:** 2.410 (5 ár)

**kr. 124.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 STC.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MR 781 **Km:** 36.000
**Árgangur:** 29.05.2006
**Útgjald:** 43.750 **Mðr. gjald:** 2.856 (5 ár)

**kr. 175.000,-**



**FORD FOCUS GHIA 1.6 BENSIN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VP 011 **Km:** 35.000
**Árgangur:** 30.12.2004
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.425 (5 ár)

**kr. 148.000,-**



**COROLLA 1.4 LUNA B. D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SF 673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005
**Útgjald:** 42.000 **Mðr. gjald:** 2.700 (5 ár)

**kr. 165.000,-**



**MAZDA 6 2.0 BENSIN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GF 564 **Km:** 97.000
**Árgangur:** 03.09.2004
**Útgjald:** 38.000 **Mðr. gjald:** 2.489 (5 ár)

**kr. 152.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 58.750 **Mðr. gjald:** 3.744 (5 ár)

**kr. 235.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D SOL DIESEL S/D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RV 811 **Km:** 113.500
**Árgangur:** 03.12.2003
**Útgjald:** 47.500 **Mðr. gjald:** 4.600 (3 ár)

**kr. 185.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 H/B AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 264 **Km:** 117.878
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.701 (3 ár)

**kr. 108.000,-**



**COROLLA 2.0 D-4D TERRA H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HA 241 **Km:** 62.285
**Árgangur:** 14.12.2004
**Útgjald:** 36.000 **Mðr. gjald:** 2.350 (5 ár)

**kr. 142.000,-**



**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.172 (5 ár)

**kr. 198.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F


# Eiðis bygdaráð skipað nevndir



Bygdaráðið í Eiðis kommunu hevur nú skipað tær føstu nevndirnar Eiðis kommuna hevur triggjar fastar nevndir. Í fíggjarnevndini eru bygdaráðsformaðurin Rólant Poulsen, Johan K. Joensen og Hans Jákup D. Johansen. Í teknisku nevnd eru Anfinnur Kruse, formaður, Tom Joensen og Jógvan K. Mørkøre, og í trivnaðarnevndini sita Tom Joensen, formaður, Johan K. Joensen og Annvør Jacobsen.

# Poe 200 ár



## Maðurin, sum yrkti "Gorpin" og skrivaði heimsins fyrstu veruligu krimisøgu, varð føddur í Boston fyri tveimum øldum síðani

Í dag eru liðin 200 ár, síðan tann amerikanski rithøvundurin og yrkjarin Edgar Allan Poe varð borin í heim í Boston. Poe, hvørs foreldur vóru ferðandi sjónleikarar, gjørdist tvey ára gamal móðurloysingur og vaks upp sum stjúksonur hjá John Allan, einum ríkum tubbakshandilsmanni í Richmond.

Árini 1815-19 búði familjan í London, har Poe fekk sína fyrstu skúlagongd. Poe las eitt ár á Virginia lærda Háskúla og og var eitt skifti á tí gitna hernaðarakademinum West Point. Hann giftist í 1836 við systkinabarni sínum, tí 13 ára gomlu Virginiu Clemm, og búði tey komandi árini við sínum húski í m.a. Baltimore, Richmond, New York og Philadelphia.

Poe var virkin sum blaðstjóri og kendur sum bersøgin kritikari við eini fagurfrøðiligari sjón, sum tá var nýggj í USA. Men hann er fyrst og fremst gitin sum skald og stuttsøguhøvundur. Hansara fyrsta yrkingasavn kom út í 1827 og hansara fyrsta søgusavn, Tales of the Grotesque and Arabesque, í 1839. Millum hansara mætastu prosaverk teljast "Ligeia", "The Fall of the House of Usher", "William Wilson" og "The Man of the Crowd". Hansara kendasta – men neyvan besta - yrking, "The Raven", er týdd til at kalla øll heimsins mál, eisini føroyskt. Tað tematiska flogið var vítt, og Poe skrivaði bæði krimisøgur, vísindaskaldslig verk, gotiskar ræðusøgur og heimspekiligar essaysøgur.

Á Poes døgum var Amerika ungt, óbúgvið, fult av andbráðum sjálvsáliti og í rúkandi samfelagsligari og tøkniligari menning. Hóast landið enn bókmentaliga var rættiliga provinsielt, hevði tað nakrar kendar høvundar, t.d. Washington Irving, J.F. Cooper og yrkjaran H.W. Longfellow. Poe er ein av teimum fyrstu í amerikonskum bókmentum, sum hevur europeiskt og heimsbókamentaligt veingjabreiði. Hann setti høg stílkrøv, skapti nýggj tekstasløg og var við til at íbirta ta lýrisku modernismuna, sum tók seg upp Fraklandi í seinnu helvt av 19. øld.

Poe fekk, meðan hann livdi, nakað av viðurkenning, men – um ein hugsar um løn ella samsýning – lítla og onga takk fyri sítt djúpa, hugtakandi, ræðandi og kveikjandi ritverk. Hann livdi meginpartin av síni ævi í ofta út av lagi fátækum korum.

Merkismaðurin Edgar Allan Poe almannakunngjørdi í apríl 1841, áðrenn orðið detektivur var smíðað, og bara tólv ár eftir at London hevði fingið sítt fyrsta yrkisliga løgreglulið, heimsins fyrstu krimisøgu, við tí afturlatna rúminum sum kjarna og berandi hugskoti. Síðani tá hava óteljandi høvundar tikið hetta tekstaslag upp, og í dag er krimisjangran ein milliarda bókmenta- og filmsídnaður.

Millum skald, sum hámettu Poe og skilmarkaðu skaldskaparhugtakið av nýggjum sambært hansara kritisku fatan, kann ein nevna Baudelaire og Mallarmé, og millum prosahøvundar, sum hann hevur ávirkað, teljast – fyri bara at nøkur dømir - Dostojevskij, H.P. Lovecraft og Stephen King.

Í einum seinni blað fer føroyski rithøvundurin Hanus Kamban, við støði í tí nýggjastu granskingini, at tekna eitt portrett av tí amerikanska skaldinum og at lýsa hansara ritverk.





**Tónleikaverkætlan í 1. flokki 2009/10**
Musikkundirvísing hvønn dag

**Tilmeldingarskjal og nærri upplýsingar um tiltakið eru á heimasíðu:**
**www.skulin.fo/kom**